## Stilo stationcar



Á Paris Motorshow var ein nýggjur Fiat Stilo stationcar sýndur fram. Bilurin er 26 cm longri enn hatchback útgávan, ið kom á marknaðin fyrr í ár. Stilo stationcar er ein rúmligur og praktiskur familjubilur

*Kelda: FDM / Motor*

## Design-virðisløn



Designstjórin hjá Renault, Patrick le Quément, fær ta týðandi Raymond Loewy Foundations designvirðislønina handaða tann 14. november í Berlin. Orsøkin til heiðurin er, at hann hevur teknað Renault bilarnar soleiðis, at teir eru annarleiðis, smartir og frammanfyri sína tíð

## StreetKa



Ford hava saman við Pininfarina gjørt hendan StreetKa, ið er bygdur yvir Ka plattformin. Bilurin kemur á marknaðin í vár við 1.6 litur motori og 95 hk.

*Kelda: FDM / Motor*

# Volvo XC90



*Volvo XC90 er er stórur og tungur bilur, ið man vera ein tann tryggast bilurin í hesum klassanum*



*Innan er XC90 ein luksusbilur, ið kann leverast við 5 ella 7 setrum*

**Fyri umleið einum ári síðan vístu vit tær fyrstu myndirnar av Volvo XC90. Bilurin, ið bleiv alment sýndur fram á Detroit Motorshow í januar, kemur nú á danska og føroyska marknaðin**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Hetta er fyrsti Volvo í SUV (Sport Utility Vehicle) klassanum. Tá Volvo koma á marknaðin við einum nýggjum bili, er eitt av endamálunum at sláa fast, at teir ganga á odda á trygdarøkinum. XC90 er onki undantak hvat viðvíkur aktivari og passivari trygd. Umframt ta innbygdu trygdina vit kenna frá øðrum Volvo bilum, hevur hesin nakrar heilt nýggjar loysnir, um tað skuldi hent at bilurin fer út av vegnum og bóltar fleiri ferðir runt. Talan er um ein stóran tungan bil, ið vigar yvir 2 tons.

Innan er XC90 ein luksusbilur, ið kann leverast við 5 ella 7 setrum. Hann fæst við tveimum bensinmotorum, annar er ein 5 syl.við 210 hk og hin ein 6 syl. við 272 hk og einum dieselmotori við 5 syl. og 163 hk. Bilurin trekkjur á øllum 4 hjólunum.

*Kelda: FDM / Motor*

# Góðar royndir við sótfiltrum

**Ferðslustýrið í Odense Kommunu hevur síðan 1999 royndarkoyrt og mett um møguleikarnar fyri at eftirmontera sótfiltur av ymiskum slagi í lastbilar og bussar, áðrenn teir strongu EURO-4 reglarnir koma í gildi í 2006**

REINT UMHVØRVI

*Magnus Gunnarsson*

Heilt síðan 1980 hevur ES sett krøv til tey ymisku akførini í sambandi við ta alsamt vaksandi luftdálkingina, ið serliga merkist í teimum størru býunum. Tá ES reglarnir, EURO-4, koma í gildi í 2006, verður roknað við at tey flestu verandi akførini við dieselmotori verða noydd at seta sótfiltur á, fyri at lúka tey ásettu krøvini. Tað skaðiliga útláti frá dieselmotorunum verður nógv avmarkað av teimum nýggju sótfiltrunum. Kommunan í Odense hevur gjørt royndir við at eftirmontera sótfiltur av ymiskum slagi á 120 tung akfør. Verkætlanin, ið kostaði 11. milliónir krónur, var fíggjað av samferðslumálaráðnum í býnum. Hesar royndirnar vístu at 80 prosent av filtrunum virkaðu nøktandi. Eitt lógaruppskot er nú á veg í Fólkatingið, har ætlanin er at leggja eitt avgjald á tey akførini sum dálk mest. Peningurin sum kemur inn skal brúkast til eina stuðulsskipan, ið skal hjálpa flutningsfyritøkum og øðrum sum eiga tey tungu dálkandi akførini við at fáa eftirmonterað sótfiltur.

*Kelda: Road Life*




*Teir størru býirnir sum t.d. Keypmannahavn og Odense fáa nógv betur luftumhvørvi, um tey tungu akførini koyrsa við sótfilturskipan. Nakrir av teimum nýggju býbussunum í Havn hava eisini sótfiltur*



# Flokstingur, fótbóltur og Fab Four

**Í døgunum 26. september til 3. oktober, vitjaði Jóannes Eidesgaard í Ongland, har hann luttók á landsfundinum hjá Labour, enska arbeiðaraflokkinum. Nógv áhugavert var at hoyra, mong kend andlit at heilsa uppá, men umframt var møguleiki at uppliva ymiskt, sum var eitt sindur uttan fyri politisku skránna, men sum tó eisini hevur politiskan týdning**

ALTJÓÐA SAMSTARV

*Dagfinn Olsen*



*Tony Benn og Jóannes Eidesgarrd: Benn er litríkur og góður talari*

Greitt hevur áður verið frá ferðini hjá formanni Javnaðarfloksins í Onglandi, har hann luttók á landsfundi hjá Labour. Her verður tikið aftur í aftur okkurt, men eisini hugt at ymsum øðrum, ið fyrifórst á ferðini, ymsum vitjanum og kendum og áhugaverdum fólkum á leiðini.

Eitt sindur um politikk, tónleik, tíðarskeið, rák, fólk og áhugaverd støð.

### Boðin við

Viðkomandi er at seta sær spurningin, hví Jóannes Eidesgaard tók lut á landsfundinum hjá Labour og hvussu hetta kom í lag.

– Tá eg var fólkatingslimur, kom í lag, at eg skuldi halda fyrilestur í einum felag í Onglandi fyri føroyingar og bretar við áhuga fyri Føroyum. Tað var L. Wilson, sum er av føroyskari ætt, av Apol ættini, sum fekk hetta í lag. Tá eg var í London bóru vit so í bandi, at Wilson skipaði so fyri, at eg fekk samband við altjóða deildina hjá Labour, sigur Jóannes Eidesgaard.

Áhugi var frá báðum pørtum fyri samstarvi og báðir partar vildu læra meira um viðurskiftini hjá hvørjum øðrum.

– Báðir flokkar byggja á sosialdemokratisk sjónarmið og á somu virði, sigur Jóanes Eidesgaard, sum hevur sent innbjóðing til Onglands til Labour, og boðið teimum við á landsfund Javnaðarfloksins, sum verður í næstum.

### Tey kendu og áhugaverdu

Mong kend nøvn vóru at síggja til landsfundin hjá Labour, sum vitugligt er. Hæddarpunktið var sjálvsagt røðan hjá Tony Blair, har hann setti øll á pláss og talaði sum ein sterkur politikari, hóast ymsar rembingar í flokkinum. Meira um tað seinni. Eisini fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton helt røðu.

Jóannes hitti John Prescot, Robin Cook og Jack Straw. Og eisini litríka Tony Benn. Hann hevur verið í parlamentinum og er aðalborin, men segði hetta frá sær, tí hann metti ikki vera rætt, at ein arvaði slíkt. Benn er kendur talari og virkin á vinstravonginum, innan friðararbeiði og við til fleiri av stóru mótmælisgongunum. Tony Benn er litríkur og framúr røðari, sum Jóannes eisini upplivdi á kvøldsetu, og Benn er eisini, kann ein siga, eitt slag av ringari samvitsku hjá Labour.

### Afrika

Sum fólkatingslimur hitti Jóannes Eidesgaard Nelson Mandela, tá hesin vitjaði har. Fleiri umboð fyri afrikansk lond tóku lut á landsfundinum hjá Labour, eisini umboð fyri ANC. Onnur umboð vóru úr t.d. Zimbabwe, Fílabeinstrondina og umboð fyri kvinnurørsluna í Botswana.

Jóannes minnir á, at almennu Føroyar stuðlaðu ANC, tá felagskapurin enn stríddist mótvegis apartheit.

Í dag hittir ein afrikansk umboð sum frí fólk og umboð fyri demokratisk lond. Nevnast kann, at andstøðu politikarar als ikki taka undir við Robert Mugabe, sum vil taka jørð frá teim hvítu bóndrunum, so svørt fáa garðarnar. Andstøðan heldur ikki hetta at flyta fólk við megi vera eina loysn, og vísir eisini á, at ilt verður at fáa produktivitet í jarðarbrúkini og stórt arbeiðsloysi er at dragast við.

– Tað hevur sjálvandi stóran týdning hjá hesum umboðum at koma á tal við fólk, sum eru við at mynda heimspolitikkin, sigur Jóannes Eidesgaard.

*Framhald á síðu 18*




*M. Owen úr Liverpool - ein áloypari og annar...*


# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD FOCUS > GHIA MODEL<**
Árg mar.99, Km 51.800. Sera vælhildin, sentrallás, CD anlegg, hita í setrunum, el-síðuspegl v.m..
Kr. 128.000.



**FORD MONDEO 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Aug.98, Km 90.000. vælhildin:Fjarðstýrt centrallás-Aircondition-hiti í setrum-El rútar/spegl v.m.. Kr. 135.000.



**PEUGEUT 306 STATIONCAR 2.0 HDI TURBO DIESEL**
Árg Okt. 99, Km 26.000. v/ MVG Sera vælhildin: C.D.Anlegg-fjarðstýrt centrallás- El.rútar - El.spegl-Hiti í setrum-Takboylar-Alufelgur-Mjørkalyktir. v.m..
Kr. 130.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 >>DIESEL <<**
Árg okt.95, Km 104.500.
Vælhildin. Kr. 75.000.



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.Bert km 29.000.
Kr. 96.000.



**RENAULT SCENIC 1.6 95 HK**
Árg Nov. 99, Km 45.000. Sera vælhildin 2.El. sóltak- El. rútar-mjørkalyktir- Spoylara aftan-Alufelgur og sleipikrók..
Kr. 148.000.

P/f. D. B. Bilar

**Jónas Broncksgøta 15**

**Tel. 310600 - Fax 310650**